Bólkur 3:

# VB og HB komin í fjórðingsfinaluna

**Í bólki 3 hava VB og HB spælt seg í fjórðingsfinaluna. Liðini hava bæði 12 stig undan seinasta leikumfari, har júst VB og HB hittast í Havn. Tá verður greitt, hvør vinnur bólkin og sostatt fær fyrimun av heimavølli í fjórðingsfinaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eftir dystirnar um páskirnar í bólki 3 í kappingini um Løgmanssteypið, er tað greitt, at bæði VB og HB hava spælt seg í fjórðingsfinaluna. Skírisdag vunnu vágbingar á Skála, meðan havnarmenn vunnu á sundalagsmonnum á Eiði. Fýra dagar seinni, 2. páskadag, vann VB sannførandi á sundalagsmonnum, meðan føroyameistararnir úr HB akkurát fingu bast skálamonnum í Havn.

### Meistararnir reistu seg

Nógv vóru spent upp á dystin á Mølini Skírisdag, tá ið HB var á vitjan hjá EB-Streymi. Havnarmenninir høvdu umfarið frammanundan verið fyri eyðmýkjandi ósigri móti VB, og nú skuldu teir royna at reisa seg. Tað eydnaðist eisini havnarmonnum at reisa seg, og teir vunnu ein uppibornan 2-0 sigur á sundalagsmonnum. Leikandi venjarin hjá HB, Heine Fernandez, skeyt bæði málini, eitt fyri steðgin og eitt eftir steðgin. Fyrsta málið kom eftir eitt verjumistak hjá EB-Streymi, so at danin gjørdist leysur, meðan seinna málið kom eftir upplegg frá Heðin á Lakjuni, sum hevur runnið frá allari verjuni hjá heimaliðnum, áðrenn hann serveraði bóltin fyri føturnar á venjaranum, sum hevði lætt við at skora til 2-0. Sundalagsmenn noyddust at verða bæði Sonna L. Petersen og Andrej Pacek fyri uttan til dystin móti HB, og tað merktist sjálvsagt hjá heimaliðnum.

Á Skála var talan um satt málgildi, tá ið VB var á vitjan. Vágbingar vunnu dystin 6-3, eftir at tað hevði staðið a jøvnum 3-3 í hálvleikinum. Nýggi litaviski áleyparin hjá vágbingum, Mindaugas, skeyt trý av málunum hjá VB, og hann tykist verða ein rættuligur fongur hjá vágbingum. Nógvi vindurin á Skála merkti týðuliga dystin, men eingin ivi var um, at tað var rætta liðið, ið fór avstað við øllum trimum stigunum.

### Vágbingar sannførandi

Sundalagsmenn vóru í Suðuroy og dystaðust við vágbingar 2. páskadag, og teir noyddust, eins og HB vikuskifti frammanundan, at fara norður aftur við einum 0-4 ósigri. Tað var VB, sum byrjaði dystin betur á Sevmýri mánadagin, men sundalagsmenninir vóru eisini vandamiklir. Millum annað noyddust Mortan úr Hørg hjá VB tvær ferðir at bjarga royndum frá altíð vandamikla Sorin Anghel á sjálvari málstrikuni. VB kom á odda,tá ið eitt korter var leikt av dystinum. Dan Djurhuus fór til baklinjuna, og hann legði væl innfyri til Palla Augustinussen, sum setti bóltin í netið. Eitt lítið korter seinni økti VB til 2-0, og hesaferð býttu teir báðir Dan og Palli um leiklut, soleiðis at tað hesaferð var Palli sum legði innfyri til Dan, sum skoraði. Tað var nær við, at EB-Streymur minkaði um munin løtu seinni, men saksasparkið hjá Sorin Anghel brast í tvørstongina. Ístaðin vóru tað vágbingar, ið øktu um leiðsluna tíggju minuttir fyri hálvleik, tá ið litavin Mindaugas skoraði til hálvleiksstøðuna 3-0.

Eftir steðgin vóru tað sundalagsmenn, ið vóru omaná, men teir høvdu ilt við at spæla seg til teir heilt stóru málmøguleikarnar. Nærmast vóru teir, tá ið eitt langskot brast í tvørstongina. Vágbingar, ið als ikki fingu glið á spælið hjá sær eftir steðgin, fingu eitt mál afturat, og tað skeyt Mindaugas við beinleiðis frísparki miðskeiðis í seinna hálvleiki. Eitt sera gott mál frætta vit úr Vági.



*Við tveimum sigrum um páskirnar helt HB fast um javnstøðuna í oddinum, og so verður talan um toppdyst, tá VB vitjar í Havn seinasta umfarið*

*Savnsmynd*

### Skála fimm minuttir frá sensatión

Í Gundadali hevði HB vitjan av Skála 2. páskadag. Meistararnir høvdu greiða yvirvág fyri steðgin, og hóast møguleikarnir vóru nógvir, eydnaðist tað teimum bert at fáa tað eina málið í fyrra hálvleiki. Málið kom, tá ið okkurt um eitt korter var farið av dystinum. Rúni Nolsøe legði innfyri úr høgru síðu, og Heðin á Lakjuni setti høvdið undir, og við sínum fyrsta málið fyri HB legði hann havnarliðið á odda 1-0. Skálamenn komu meiri og meiri við í dystin, og tá ið Símun Eliasen hjá HB fekk sítt næsta gula kort stutt eftir steðgin, setti Skála seg av álvara á dystin. Knappir 20 minuttir vóru eftir at leika, tá ið Skála fult uppiborið fekk javnað við einum máli frá Ronni Hansen. Einar tíggju minuttir seinni eydnaðist tað so gestunum at leggja seg á odda 2-1. Verjan hjá HB skal sparka bóltin burtur, men rakar í dómaran, og bólturin støkkur til Alexandur Johansen hjá Skála, sum smekkar til. Bólturin tekur í eitt HB-bein og snýtir málverjan hjá heimaliðnum, og so var Skála á odda og einans tíggju minuttir eftir at leika.

Leiðslumálið hjá skálamonnum fekk onkursvegna heimaliðið at vakna við, og teir settu nú ferð á. Einans fýra minuttir vóru eftir at leika, tá ið Heðin á Lakjuni, ið var klárt besti maður hjá HB, stríddi seg til eitt útjavnandi mál, og í yvirtíðini fekk HB sigursmálið. Ungi Hendrik Rubeksen var komin á vøllin bert fáar minuttir fyri leiklok, og hann sendi liðskiparan Rúna Nolsøe avstað í høgru, tá ið farið var út um vanligu leiktíðina. Rúni sendi bóltin innfyri aftur, og við handaru stong var kom Hendrik tuskandi og setti fótin á, og so var HB á odda 3-2. Ótrúliga bitturt hjá skálamonnum, sum vóru bert fáar minuttir frá fyrstu sensatióini í hesum kappingarárinum.

Við úrslitunum um páskirnar er tað greitt, at VB og HB eru komin víðari, meðan tað verður trupult hjá EB-Streymi at spæla seg víðari. Komandi vikuskifti hittast VB og HB í Havn, og vinnarin av tí dystinum vinnur bólkin og harvið eisini heimavøll í fjórðingsfinaluni.

**Skála-VB 3-6 (3-3)**
1-0: Iulian Florescu
1-1: Ander Sørensen
1-2: Mindegaus
2-2: Jonhard Frederiksberg
2-3: Palli Augustinussen
3-3: Eugen Stanciu
4-3: Mindegaus
5-3: Palli Augustinussen
6-3: Mindegaus

**EB/S-HB 0-2 (0-1)**
0-1: Heine Fernandez
0-2: Heine Fernandez

**VB-EB/S 4-0 (3-0)**
1-0: Palli Augustinussen
2-0: Dan Djurhuus
3-0: Mindaugas
4-0: Mindaugas

**HB-Skála 3-2 (1-0)**
1-0: Heðin á Lakjuni
1-1: Ronnie Hansen
1-2: Alexandur Johansen
2-2: Heðin á Lakjuni
3-2: Hendrik Rubeksen



Bólkur 2

# Toftamenn í trupulleikum

**GÍ og ÍF hava ognað sær teir báðar fremstu sessirnar, men tað sær nú svart út hjá B68 í royndunum at vinna seg víðari**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan páskunum hevði B68 framvegis eina hampuliga bjarta vón um, at tað skuldi bera til hjá teimum at spæla seg víðari úr bólkaspælinum í steypakappingini, men tann vónin er nú um at kámast.

Bert trý stig spurdust burtur úr teimum báðum dystunum hjá toftamonnum, og hetta var í øllum førum eitt minni enn tað, sum vónirnar vóru um.

Og toftamenn kendu seg eisini eitt sindur órættvíst viðfarnar í Fuglafirði skírisdag. Longu eftir lítlum korteri legði Hanus Eliasen heimaliðið framum, og størsta partin av fyrra hálvleiki vóru fuglfirðingarnir eisini omaná. Seinna umfarið royndi B68 at trýsta, og teir fingu eisini tvingað seg til eina ávísa yvirvág, men tað eydnaðist ikki at skjóta neyðuga málið.

Annan páskadag átti B68 so heimavøll móti TB, og her var kravið púra einfalt ein sigur. Tað eydnaðist eisini hjá árstalsfelagnum at tryggja sær hendan, men 1-0 móti einum liði úr næst bestu deildini var helst ikki tað, sum heimaáskoðararnir høvdu roknað við.

Tað skal tó sigast, at B68 hevði hópin av møguleikum at gera sigurin enn tryggari, men gott málverjaspæl og vantandi neyvleiki gjørdu tó sína ávirkan, og so má B68 sláa seg til tols við teirri sannroynd, at teir nú hava fýra stig undan seinasta umfarinum.

Tað hevur EB/Streymur eisini, men seinasta umfarið tykist tó nakað ólíkt hjá hesum. Tá hevur EB/Streymur heimavøll móti Skála, meðan B68 tekur ímóti GÍ. Ein dystur, sum toftamenn skulu vinna, men sum hagtølini siga sína greiðu fatan um.



*Eftir tepra heimasigurin á TB er B68 framvegis við í kappingini um at koma víðari, men tað sær heldur trupult út í løtuni*

*Mynd: Álvur Haraldnse*

### ÍF dyrgir eftir heimavølli

Oddasessurin í bólkinum var ein spurningur millum GÍ og ÍF. Her høvdu gøtumenn betri kortini eftir sigurin í Fuglafirði í næsta umfarinum, og skírisdag styrktu teir um støðuna við einum tryggum 4-0 sigri á TB. Stóri maðurin tann dystin var Krzystof Popczynski, sum stóð fyri trimum av málunum, og tó at hann eisini misnýtti aðrar góðar møguleikar, so er sjónligt, at hann fer at hava meira enn vanliga stóran týdning fyri GÍ í ár.

Annan páskadag var so oddabrakið á skránni, men leikliga gjørdist dysturin eitt stórt vónbrot. At GÍ eisini varð skert miðskeiðis í uppgerðini, tá Súni Olsen fekk sítt seinna gula kort, hevði sína stóru ávirkan í hesum, men heimaliðið megnaði so kortini at halda fast um oddasessin.

Krzystof var aftur her avgerandi faktorurin, tá hann í seinna hálvleiki skeyt einasta málið í dystinum, og so kunnu gøtumenn nakað róliga gera seg til reiðar til fjórðingsfinalurnar, har teir nú eru vísir í at fáa heimavøll.

Tað kunnu fuglfirðingarnir eisini fáa, men tað er so treytað av úrslitunum hjá KÍ, VB og HB í seinasta umfarinum, eins og ÍF tá helst skal vinna ein trivaligan sigur í heimadystinum móti TB.

**ÍF-B68 1-0 (1-0)**
1-0: Hanus Eliasen

**GÍ-TB 4-0 (3-0)**
1-0: Krzystof Popczynski
2-0: Krzystof Popczynski
3-0: Hans Pauli Petersen
4-0: Krzystof Popczynski

**B68-TB 1-0 (1-0)**
1-0: Øssur Hansen

**GÍ-ÍF 1-0 (0-0)**
1-0: Krzystof Popczynski



*Leikliga gjørdist grannauppgerðin millum GÍ og ÍF ongantíð tann stóra upplivingin, men GÍ fekk so ognað sær sigurin og oddasessin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Einki til føroysku feløgini

**Johan B. Hansen og Horsens eru við at missa takið í toppinum, og í botninum stendur ikki væl til hjá Fremad Amager, sum hesa ferð bara hevði ein føroying á liðnum, og hann varð skjótt tikin av vøllinum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur ikki væl hjá føroyingunum í næstbestu donsku deildini. Hesa ferð var tað frægast hjá Vejle, sum ongan føroying hevði á liðnum. Sum tað varð nevnt í síðstu viku, so er Ian Højgaard givin í felagnum, og Christian Høgni Jacobsen verður ikki førur fyri at spæla næsta árið. Vejle átti heimavøll ímóti Køge, sum er eitt sindur omanfyri miðjuna. Vejle var tvær ferðir á odda, og báðu ferðirnar javnaði Køge í sama minutti, sum Vejle hevði lagt seg framum.

Í Sundby hevði Fremad Amager heimavøll ímóti Skjold. Eftir tvey tøtt mál í 1. hálvleiki fóru gestirnir um Knippelsbro og aftur á Eysturbrúgv við øllum stigunum. Fremad Amager er nú niðanfyri niðurflytingar strikuna. Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør vóru ikki á vøllinum. Jann Ingi hevur trupulleikar við lærkrikanum, og Hjalgrím er knæskaddur.

Andrew av Fløtum var í álopinum frá fyrsta bríksli. Eftir hálvan tíma, tá ið Skjold hevði fingið bæði málini, varð hann tikin út. Hann hevði ikki gjørt nóg nógv til nyttu, veit Fremad Amager heimasíðan at siga.

Síðani kappingarbyrjan hevur AC Horsens við Johan B. Hansen á liðnum verið oddalið. 2. páskadag mistu teir oddasessin. Tað gjørdu teir eftir fullkomuliga óvæntað tap í Keypmannahavn. Á Tingbjerg stadion vann heimaliðið Brønshøj 1–0. Brønshøj hevur mesta partin av kappingini verið niðanfyri strikuna. Tað eru teir ikki meiri. Talan var um fjórða tapið hjá Horsens í hesum kappingarárinum. At liðið er í aldudali sæst aftur av, at hetta var triðja tapið síðani vetrarsteðgin.

Silkeborg, sum flutti niður síðsta summar, er nýtt oddalið. Teir vunnu 2–0 í Odense ímóti B1913, sum longu tykist hava mist endan.

Størsta hóttanin ímóti niðurflytingarplássinum hjá Horsens er frá Randers. Hesa ferð vunnu teir á heimavølli 4–2 ímóti Sønderjydske, sum annars hevur kjáklast fram ímóti Randers.

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 4 - 1 - 0 | 19 | 3 | 16 | 13 |
| 2 | KÍ | 5 | 2 - 3 - 0 | 14 | 5 | 9 | 9 |
| 3 | NSÍ | 5 | 1 - 2 - 2 | 8 | 10 | -2 | 5 |
| 4 | FSV | 5 | 0 - 0 - 5 | 2 | 25 | -23 | 0 |

**Bólkur 2**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 11 | 1 | 10 | 15 |
| 2 | ÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 11 | 5 | 6 | 9 |
| 3 | B68 | 5 | 1 - 1 - 3 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 4 | TB | 5 | 0 - 1 - 4 | 2 | 14 | -12 | 1 |

**Bólkur 3**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 | HB | 5 | 4 - 0 - 1 | 9 | 8 | 1 | 12 |
| 3 | EB/S | 5 | 1 - 1 - 3 | 6 | 12 | -6 | 4 |
| 4 | Skála | 5 | 0 - 1 - 4 | 7 | 15 | -8 | 1 |